ALMANNASTOVAN

Samskipari

Søkt verður eftir samskipara til Dagtilhaldið Rók, sum er royndarskipan fyri fjølbrekað børn úr Nes og Runavíkar Kommunu. Starvið er tíðaravmarkað til 31.12.2003 og samskiparin hevur tilvísing til leiðarin á brektoyminum.

Uppgávur:
- Uppgávurnar eru at samskipa arbeiði viðvíkjandi viðgerð, umlætting, eins og stimbran og menna av stuðulsarbeiðinum við fjølbrekaðum børnum.
- Eisini skal samskiparin saman við upptøkunevndini gera av, hvørji børn kunnu verða upptikin til tilhaldið.

Ábyrgdarøki:
- Samskiparin hevur ábyrgd av leiðslu, ráðlegging og samskipan av tilhaldinum.
- Ábyrgd av at menna tilhaldið soleiðis at tað er tillagað tørvinum hjá brúkarunum.

Førleikakrøv:
Vit ímynda okkum ein persón, sum hevur
- Viðkomandi fakliga útbúgving
- Umsitingarligar og fakligar royndir
- Evni at seta í verk fyriskipanir
- Góð samstarvsevnir
- Góð evnir at orða seg bæði munnliga og skrivliga

Lønar- og setanarviðurskifti:
Starvið er lønt sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær Elspu Olsen, leiðara av brektoyminum, tlf. 353510 millum kl. 09.00 og 13.00.

Málsviðgeri

Á Almannastovuni er eitt starv sum avloysari fyri málsviðgera í farloyvi á Arbeiðsmarknaðardeildini leyst at seta sum skjótast og inntil 01.09.2004.

Arbeiðs- og ábyrgdarøki:
- Ráðgeva og vegleiða í samband við arbeiðsmarknaðin
- Gera virkisætlanir til tess at fáa fólk út á arbeiðsmarknaðin
- Gera tilráðingar viðvíkjandi fyritíðarpensiónum
- Geva almenna ráðgeving og vegleiðing um stuðulstiltøk innan almannaøkið
- Uppfylgja dagpeningamálum.

Arbeiðsuppgávur:
- At fremja fyrisitingarliga partin av málsviðgerðini
- Taka ímóti áheitanum, sum koma til deildina.

Førleikakrøv:
- Skrivstovuútbúgving, HH, ella onnur fyrisitingarlig útbúgving
- Royndir innan almenna fyrisiting
- Kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- Góður málburður í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga
- Kunnleiki til medisinska terminologi er ein fyrimunur

Lønar- og setanarviðurskifti:
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Marjun Berg, deildarleiðara á tlf. 353510

Fyri bæði størvini er galdandi:

Vit bjóða:
- Starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum.
- Møguleika fyri persónligari og fakligari menning

Umsóknir:
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. verður at senda til

Almannastovuna
Att.: Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri
J. Broncksgøta 27
Postboks 3096
110 Tórshavn

Umsóknarfreist: 22.09.2003

Um Almannastovuna
Fyri at betra um tænastustøði hevur Almannastovan framt bygnaðarbroytingar, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar.
Høvuðsuppgávan hjá Almannamiðstøðunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni ein og at taka avgerðir.
Almannastovan hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjaligu ábyrgdina av veitingum, fyriskipaðar eftir pensjón- dagpeninga- og forsorgarøkinum v.m.
Stovnurin umsitur fyri umleið 800 mill. kr. og her arbeiða umleið 100 fólk.
Almnnastovan hevur almannamiðstøðir í Tórshavn, Suðuroy, Eysturoy og í Norðoyggjum, og harumframt fevnir stovnurin um Hjálpartólamiðstøðina og aðrar landdekkani serdeildir.

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

Heimarøktin Suðuroy

Størv og farloyvisstørv

Vegna farloyvi verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingi 1. oktober 2003 til 1. okt. 2004, at arbeiða í skiftandi vaktum.

Vit sóknast eftir røktarstarvsfólki sum
- við røktarfakligum royndum
- hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt við ábyrgd
- hevur góð samstarsveni
- er før/ur fyri at arbeiða undir skfitandi umstøðum

Vit bjóða:
- eitt starv við møguleika at menna starvs innihaldi
- eitt spennandi arbeiðspláss við nógvum røktarfakligum uppgávum
- eitt gott arbeiðsumhvørvi.

Lønar- og setanartreytir:
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Sjúkrarøktarfrøðingafelag Føroya.

Um tú ynskir at vita meir um starvið, ert tú vælkomin at ringja til:

Jeanna í Lágabø, økisleiðara, tlf. 373907.

Umsókn: Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

Heimarøktin
900 Vágur

Umsóknarfreist: **18. september 2003.**

Arbeiði á dekkverkstaði!

Søkt verður eftir einum fólki at arbeiða á dekkverkstaði okkara.

Tað er ein fyrimunur um tú ert útbúgvin lastbil- ella bilsmiðjur, – hetta er tó ikki eitt krav.
Tú skalt vera hugaður at veita viðskiftafólkum okkara góða og skjóta tænastu.

Talan er um fast arbeiði. Føst løn samb. avtalu.

Er nakað fyri teg, so send okkum eitt bræv ella ein e-mail.

DEKK SENTRIÐ

Falkavegur 1 · 110 Tórshavn
e-mail: gunnar@dekk.fo

Bilmekanikari søkist

www.suzuki.fo

Spf. Eyðbjørn Hansen SUZUKI
FO-100 Tórshavn • Tel. 313375 og 213375

Bygningur hjá Hydro Tech PF til sølu

Um hóskandi boð fæst er framleiðslubygningurin hjá Hydro Tech á Eiði til sølu.

Samlaða gólvviddin er 1200 m² (30 x 40 m). Av hesum eru 200 m², í tveimum hæddum, nýtt til goymslu, skrivstovu, fundarhøli, umklæðingarhøli og matarhøli.
Í høllini eru monteraðir tveir 5 tons traverskranar. Arbeiðshæddin er 8 m.

Áhugað kunnu venda sær til Ólav Asafsson Olsen á skrivstovuni hjá KJ-Hydraulik á Kambsdali, tlf. 444170 frá kl. 08.00 til 16.00, ella senda ein teldu post til: oao@kj-hydraulik.com

Aðalfundur

P/f Flogsamband F. F.

Kallað verður við hesum inn til ársaðalfund viðvíkjandi roknskaparárinum 2002/2003 (1/4-02 til 31/3-03)

mikudagin 24. september 2003, kl. 14.00 á Hotel Hafnia.

Skráin er:
a) Frásøgn nevndarinnar frá virki felagsins í farna ári
b) Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar
c) Uppskot frá nevndini um, hvussu ársavlopið sambært góðkenda roknskapin skal verða nýtt
d) Uppskot frá nevndini um **avtøku** av felagnum

Uppskot frá partaeigarum skulu, fyri at koma til viðgerðar á aðalfundinum, vera nevndini í hendi 10 dagar fyri aðalfundin og skulu sendast til postsmogu 1218, 100 Tórshavn.

Nevndin

Kranaskeið E yvir 25 TM

byrjar mikudagin 10. september kl. 19.15.

Tilmelding á **tlf. 318821** ella **218777.**

Sp/f Koyrikortið
v/ Hans J. Hermansen
Slættanesgøta 5

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL

Sunnudagstúrin 7. september
Vit bjóða *frá kl. 12.00*
Rækjubland
Heilstokt krúnhjortatjógv
Omaná
148,-
Børn ½ pris!

Sunnudagin 7. september
Stórt køkuborð *frá kl. 13.00*
Sjálv-tøku-køku-borð
Et so nógv tú orkar fyri **45,-**
Børn 25,-

Minst til:
Drive-In Bingo
kl. 17.00 á
Flog-breytini

FLOGFELAG FØROYA • SØRVÁGUR • TEL 33 29 55 • FAX 33 23 10 • T-Postur: hotel@ff.fo
HOTEL VÁGAR

Raðhús til sølu við Løgmannabreyt

- sera gott útsýni!

Prísur:
Hús stødd 100 m² kr. 1.100.000,-
Hús stødd 112 m² kr. 1.150.000,-



Møguleiki er eisini at keypa innilokaði hús

SP/F S. H. SMÍÐ V/ HANUS OLSEN
TEL 32 12 24 · FARTEL 21 12 24 · FAX 32 13 24

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli

Skeið í urtagarðslæru byrjar 18. september.
Hósdagar kl. 18.00-20.15 og nakrar leygardagar.
Lærari er Michael Jacobæus.

Undirvísingin er í stovu 207 í Kommunuskúlanum. Kostnaður 580 kr.

Tilmelding á tlf. 31 77 55

MARIASYSTIR JOSUANA úr Noregi hevur, um Gud vil, hesi møti:

13/9	Leygardag, Tórshavn Ungdómsmøti í KFUK kl. 20.00 Ung syngja
14/9	Sunnudag, Vestmanna Missiónshúsið kl. 19.30
17/9	Mikudag, Sandur Missiónshúsið kl. 19.30
18/9	Hósdag, Vágur Missiónshúsið kl. 19.30
19/9	Fríggjadag, Tvøroyri Missiónshúsið kl. 19.30
23/9	Týsdag, Sørvágur Missiónshúsið kl. 19.30

Hjartaliga vælkomin til øll møtini.
Fleiri upplýsingar á tlf. 314750, 456030, 511614